TINGHÚSVEGI 64 • FO-100 TÓRSHAVN • TLF. +298 356610 • FAX +298 356611 • BRL@BRL.FO • WWW.BRL.FO



# Byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur til Brunaumsjón landsins

## Starvið at taka við leiðsluni á Brunaumsjón landsins er leyst at søkja.

**Ábyrgdarøkið**
Ábyrgdin hjá nýggjum leiðara fevnir m.a. um tilbúgving, fyribyrging, váðameting, málsviðgerð, góðkenning, eftirlit, vegleiðing, og annars ásetingum, ið eru fevndir av bruna- og tilbúgvingarlógini. Leiðarin skal hava fakliga vitan á hesum ábyrgdarøkjum.

Tann, ið settur verður, skal halda stovninum á høgum vitanarstøði viðv. fyribyrging, brunatrygd, sløkking, bjarging og tí, ið knýtir seg at hesum.

**Fakligur førleiki**
Sóknast verður eftir fólki, ið hevur hollan kunnleika, starvsroyndir og útbúgving innan m.a.
- kommunala og landsfevnandi tilbúgving,
- brunatrygdarligar byggireglur og brunatekniskar serfyriskipanir um vandamikil evni,
- vanliga og óvanliga byggimálsviðgerð á teim yisku byggiligu økjunum og,
- skal hesin umframt evna at lata stovnsins vitan koma myndugleikum, vinnuvirkjum og almenninginum til kunnleika og gagns.

Dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, at setti persónurin er fyrikomandi, hevur góð samstarvs-evni, dugir at skipa fyri á arbeiðsøkinum og at taka sjálvstøðugar avgerðir í minni sum stórum málum.

**Setanarviðurskifti**
Løn, viðbøtur og setanartreytir annars, verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tænastustaðurin er á skrivstovuni í Tórshavn.

Tann, ið settur verður, skal kunna taka við starvinum tann 1. juli 2009.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til Tilbúgvingarstovn Føroya, Tinghúsvegi 64 Tórshavn, og skal vera skrivstovuni í hendi innan 11. mai 2009. Brævbjálvin eigur at merkjast »Starv á Brunaumsjón landsins«. Stovnurin skilar sær rætt til at velja ein umsøkjara til starvið ella at vraka allar umsóknirnar og at søkja av nýggjum.
Umsóknir, prógv, førleika- og útbúgvingarlýsingar o.a. verða viðgjørd í trúnaði.

Nærri upplýsningar um starvið kunnu fáast frá Petur Olsen, deildarstjóra á tel. 35 66 10 ella 21 50 46. Teldupostur: brl@brl.fo

# Arkitektur til býarskipanardeildina

Tórshavnar kommuna søkir eftir starvsfólki til býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber. Viðkomandi skal vera útbúgvin arkitektur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

**Nakrar av høvuðs-uppgávunum eru:**
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- sektorplanlegging
- útstykkingarætlanir
- verkætlanarskitsur og fylgja málum upp
- bygging av kommunalum bygningum
- luttaka í verkætlanum við uttanhýsis ráðgevum
- samskifta við áhugabólkar, feløg, privatpersónar og stovnar

**Førleikakrøv**
Tú ert útbúgvin arkitektur ella hevur viðkomandi útbúgving, umframt at tú:
- hevur royndir innan planlegging, prosjektering, eftirlit og umsiting
- hevur góðan telduførleika (Cad tekniprogram og/ella MicroStation)
- dugir væl føroyskt, bæði í skrift og talu
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at leggja arbeiði til rættis
- ert fyrikomandi og dugir væl at arbeiða saman við starvsfólkum á deildini

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael H. Viderø, býararkitekt, ella Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra, telefon 30 20 10.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 5. mai 2009 kl. 13.00.

Merkið umsóknina »Arkitektur til býarskipanar-deildina«.



Tórshavnar kommuna